# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gummibein í Liverpool



*Mido spældi í gjár sín fyrsta dyst fyri Wigan. Og hann vann sær mest sum hetjustøðu alt fyri eitt, tá hann var ósvikaliga tryggur úr 11 metrum*

Mynd: Polfoto/AP

**Seinastu vikurnar hevur Liverpool meist ferðina í ensku Premier League. Mikukvøldið gjørdist talan um enn eitt vónbrot**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Setningurin hjá Liverpool í gjárkvøldið var at vinna seg upp á liðina á Mancheter United, sum tykist vera í ferð við at skræða seg leyst í oddinum í Premier League.

Talan hevur seinastu vikurnar verið um fleiri vónbrot hjá Liverpool, og enn eina ferð máttu viðhaldsfólkini ásanna, at liðið ikki megnaði at standa móti trýstinum seinastu minuttirnar.

Banyaoun legði annars Liverpool á odda stutt fyri hálvleik, og fram til bara seks minuttir restaðu, tóktist hetta eisini vera avgerandi málið. Men tá varð Leiva Amr Zaki feldur í brotsteiginum, og brotssparkið, sum spurdist burtur úr hesum setti Mido í kassan.

Samstundis vann Chelsea 2-0 í heimadystinum móti Middlesbrough, og nú er bláa London liðið ájavnt Liverpool á øðrum plássi í deildini.

Og í botninum á talvuni gjørdist støðan ikki minni spent í Newcastle, har Colin Calderwood enn ikki tykist hava fingið skil upp á verjupartin, sum hann annars hevur fingið ábyrgdina av seinastu fýra mánðirnar av kappingarárinum.

**FAKTA**

**Úrslitini**

| | |
|---|---|
| Wigan-Liverpool | 1-1 |
| Chelsea – Middlesbrough | 2-0 |
| Manchester City – Newcastle | 2-1 |
| Blackburn – Bolton | 2-2 |
| Everton – Arsenal | 1-1 |
| West Ham – Hull | 2-0 |

# Bardust á Oyrarbakka

Sunnudagin skipaði Sunda Judofelag fyri judokapping. Bæði fyri tey, ið eru byrjaði at venja judo í vetur og tey, ið hava verið við eina tíð.

Luttakararnir vórðu býttir upp soleiðis, at tey nýbyrjaðu vóru fyri seg, so tey kappaðust móti javnlíkum og harvið høvdu møguleika at vinna sínar dystir.

Kappingin varð eisini skipað soleiðis, at luttakararnir vórðu býttir í bólkar við trimum luttakarum í hvørjum, soleiðis at øll vunnu medaljur. Hetta metir felagið vera gott fyri børnini at hava viðhvørt, tí í vanligu kappingunum eru tað ofta tey somu, sum vinna heiðursmerki, meðan onnur altíð standa eftir við ongum.

Tey meira royndu børnini og eisini vaksin vóru harumframt við í kappingini, og eisini í teimum bólkunum vóru nógvir góðir dystir.

Stórur áhugi er um tey vaksnu, sum í summar skulu til eitt nú Oyggjaleikirnar at umboða okkum.

Har kundu vit staðfesta, at støðið er á rættiliga góðari leið og venjingarnar sýnast at ganga væl, tí serliga í hesum bólkunum sóu vit sera nógvar góðar og javnar dystir, har úrslitið kundi farið báðar vegir, so spenningurin er stórur til komandi altjóða avbjóðingar.

Næsta judokappingin verður sunnudagin 8. februar á Oyrarbakka, tá eitt regluligt umfar av liðkappingini verður.



*Í mun til vanligu kappingarnar var leisturin hesa ferð meira javnbjóðis, soleiðis at einstøku íðkararnir høvdu betri møguleika at vinna sínar dystir*

# Jógvan Martin er formaður

**Jógvan Martin Olsen, fyrrverandi landsliðsvenjari, er valdur til formann í Venjarafelag Føroya**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Á stovandi aðalfundinum leygardagin hjá Venjarafelag Føroya varð ein nevnd vald, sum nú hevur skipað seg. Jógvan Martin Olsen, fyrrverandi landsliðsvenjari, verður formaður, meðan Áki Johansen er næstformaður og Bill McLeod Jacobsen er skrivari og peningarøkil. Tiltakslimur er Abraham Løkin.

Endamálið við nýggja venjarafelagnum er, at stuðla og savna venjarahópin í Føroyum, og saman við Fótbóltssambandinum menna hesar, soleiðis, at venjararnir allatíðina flyta seg fakliga og fylgja altjóða rákinum. Tað skrivar heimasíðan hjá FSF.

# 10. ferð hjá Wilbek

Ulrik Wilbek hevur vunnið nógvan heiður. Bæði við donsku kvinnunum og monnunum. Hálvfinalan hjá honum í dag verður tann tíggjunda hjá honum sum landsliðsvenjari, og tað eru fáir venjarar, sum hava somu hagtøl at vísa á. Vit lata ølini tala fyri seg:

**Við danska kvinnulandsliðnum:**
1993: HM silvur
1994: EM gull
1995: HM bronsa
1996: EM gull
1996: OL gull
1997: HM gull

**Við danska manslandsliðnum:**
2006: EM bronsa
2007: HM bronsa
2008: EM gull
2009: HM ?